# Spenningurin er óbroyttur

**Helgi L. Petersen ger ikki longur um seg í fremstu føroysku fótbóltsrøðini. Men spenningurin til dystirnar hjá NSÍ og øðrum feløgum er framvegis tann sami**

Hóast navnabrævið enn ikki er 30 ára gamalt (tað verður tað um eina viku), telist Helgi L. Petersen nú millum fyrrverandi spælararnar í fremstu føroysku fótbóltsrøðini.

Rituvíkingurin var í fleiri ár partur av fremstu liðunum hjá NSÍ og GÍ, og eisini gjørdist talan um einar seks skrásettar A-landsdystir.

Í fjør var hann at byrja við partur av B36-hópinum, men tá ein fótliðsskaði argaði longu í fyrsta steypadystinum, valdi hann at siga stopp.

- Avgerðin var kanska tikin longu undan hesum. Hjá mær er tað soleiðis, at arbeiðslívið og útbúgvingin ikki hava sampakkað serliga væl við fótbólt í fremstu røð. Tað krevur, at tú hvørja viku skal seta eini fýrafimm kvøld av til venjing, og tað havi eg ikki møguleika til. Og eg tími ikki at vera partur av onkrari hálvari loysn, har eg ikki fái givið meg fult út.

- Eg havi so eisini havt mín part av skaðum, og tað hevur argað nakað. Men vóru umstøðurnar í aðrar mátar til tað, so vildi hetta helst ikki verið tað, sum steðgaði mær, sigur Helgi L. Petersen.



*Arbeiði og útbúgving í borgarliga starvinum sampakka ikki serliga væl við tilveruna sum fótbóltsspælari í fremstu røð. Tað var kanska ein skaði, sum setti seinasta punktumið hjá Helga, men hann heldur kortini, at avgerðin tá longu var tikin*

**Spurdur hundrað ferðir**

Soleiðis var seinasti Formula-dystkurin hjá Helga við NSÍ í 2006. Seinnu helvt av kappingarárinum í fjør spældi hann við ÍF, og nú er tað so í triðju bestu deildini við Fram, at hann spælir. Og hann er skjótur at sláa fast, at talan ikki verður um nakað come-back. At NSÍ so árið eftir vann sítt fyrsta FM-heitið, var kanska lagnunnar speisemi, men Helgi er skjótur at staðfesta, at hann var minst líka fegin um gullið, sum øll onnur kring felagið.

- Eg eri nokk spurdur fleiri hundrað ferðir, um tað ikki var keðiligt, at eg ikki var partur av hesum. Og tað er tað kanska. Hinvegin skal eingin ivi vera um, at eg so hjartaliga unni NSÍ gullið. Har eru ein rúgva av fólki í og kring felagið, sum hava gjørt eitt risa-arbeiði í fleiri ár. Og tey hava so sanniliga uppiborið hetta.

Og tú vart kanska eisini við, tá stóra gullveitslan varð hildin eftir kappingarárið´?

- Tíverri fekk eg ikki verið við til sjálva veitsluna, tí eg var uttanlands í arbeiðsørindum. Men eg ferðaðist við áskoðarunum til fleiri av seinastu dystunum, og tað var ótrúliga stuttligt. Tá tú ert givin sum spælari, er leilkuturin sum áskoðari kanska eitt sindur løgin. Men tú ert í øllum førum minst líka spentur tá, sum tá tú sjálvur ert partur av spælinum.

**Trý í toppinum**

Helgi L. Petersen fer eisini at teljast millum teirra, sum í ár fara at brúka fleiri sunnudagar við ymsu vøllirnar. Og enn sum áður er tað NSÍ, sum hann brennur mest fyri.

- Soleiðis vil tað jú altíð vera. Eg eri jú uppvaksin í felagnum, so alt annað vildi verið heldur løgið. Eg búgvi tó í Havn í dag, so túrarnir í Gundadal verða helst fleiri, men ivaleyst villist eg eisini inn til Løkin onkran dystin.

Nógv hevur verið tosað um, at tað verða EB/Streymur og HB, sum fara at bjóða NSÍ av í oddinum. Ert tú samdur í hesum?

- Ja. Seinastu árini hava tað verið tey trý og B36, sum hava myndað oddin. Og akkurát nú er líkt til, at B36 eina løtu fer úr avgjørdar oddinum.

- Men millum tey trý er vónleyst at taka dagar ímillum, hvør fer at standa ovast, tá avtornar. Spælara fyri spælara er styrkin at kalla tann sama, so tað verður ein kapping, har smáir marginalar og innanhýsis dystirnir koma at avgera.

- Og øll trý hava tey væl eisini sínar fyrimunir ella vansar. Hjá NSÍ er fyrimunurin helst, at nú hevur liðið roynt at vinna gullið, og tí duga teir at standa í tí støðuni. Men hinvegin er tað jú altíð trupult at verja gullið. Hjá EB/Streymi er svongdin kanska størst, men tað merkir jú eisini, at spælararnir ikki hava vunnið fyrr. Og hjá HB skulu tey reisa seg eftir eitt eftir teirra mátistokki vánaligt kappingarár. Men tað leggur hinvegin aftur trýst á liðið. So tað talar fyri og ímóti hjá øllum.

- Tað einasta, sum eg tori at gita, er, at tað verður øgiliga tætt. Og eg gleði meg sjávlandi til at fylgja við frá síðulinjuni, sigur Helgi L. Petersen.

---------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*